Runavíkar Kommuna søkir eftir

## Ergoterapeuti til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
Avloysara fyri ergoterapeuti í barnsburðarfarloyvi, 20t um vikuna, til stovuna við børnum við serligum tørvi, starvið verður sett frá 1. mai 2008 til 1. feb 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. apríl 2008, kl. 12.00.

***Runavíkar Kommuna***
***Heiðavegur 26***
***Postrúm 139***
***FO-610 Saltangará***

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur, 1 barnagarðsstova við 6-ára gomlum børnum og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

TVØROYRAR KOMMUNA

## Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktara til ansing av børnum í Hvalba í ½ tíð seinnapart

**Vit vænta av tær:**

- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri..
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir viðring fyri børnunum,foreldrum og starvsfeløgum.
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Í dagrøktarskipanini í Hvalba starvast 6 dagrøktarar og ein leiðari.

Talið av børnum í dagrøktini eru 27 børn

Ein dag um vikuna eru dagrøktarnir saman við børnunum í spælistovuni.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 17.15

Vit kunnu bjóða tær starv í góðum og tryggum arbeiðsumstøðum, við góðum og álítandi samstarvsfeløgum

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til dagrøktarleiðaran í Tvøroyrar kommunu á tlf. 211339 og tosa við dagrøktarleiðaran Súsannu Poulsen

**Umsóknarfreist: 17 apríl 2008, kl.16.00**

Vinarliga send umsókn tygara til

**Tvøroyrar kommunu**
Dagrøktarskipanin
800 Tvøroyri

zarepta

**Familjulega fyri brekað**
**So ymisk og tó...**

Hjartaliga vælkomin á legu í Zarepta í døgunum 17.-20. apríl 2008 - Legan er ætlað øllum, ið bera brek og familjum teirra.

**Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:**

- andakt
- sangur
- fyrilestrar
- pallborð
- samtalubólkar
- kvøldsøga
- tónleikur
- leikvenjing
- fimleikur
- ríðing
- svimjing
- túrar
- spæl úti og inni
- ymisk ítriv
- video

**Fyrilestrar:**
***Fríggjadagin 18. Apríl***
kl. 10.00 At fáa diagnosu, og hvat so
Óli Wolles
kl. 15.30 Omma hjá brekaðum barni
Jona Nielsen
kl. 20.00 Pedagogiskir førleikar og menningartarnað
Marjun Højgaard o.o.

***Leygardagin 19. apríl***
kl. 14.00 Autisma – Ein dagligdagur fyrr og nú
Karl Martin Samuelsen
kl. 20.30 Hjartað og heilsa
Heðin Thomsen

**Havið hettar við**
Dýnuvár, koddavár og lak
Um tú verður við á túrum og svimjing – heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistúvlar og svimjiklæði.

**Kostnaður fyri leguna:**

| | |
|---|---|
| Børn 0-5 ár | ***100 kr.*** |
| Børn 6-14 ár | ***225 kr.*** |
| Vaskin | ***400 kr.*** |

Konto 6460-156.666.2– havi kvittan við vestur

Húsið er opið hóskvøldið kl. 18.00
Nátturði verður boðin frá kl. 19.30
Legan verður sett kl. 21.00

Ring til ein av undirritaðu, um spurningar eru í samband við leguna.

**Norðoyggjar**
Jógvan Tróndheim, tlf. 456822

**Suðuroy**
Majbritt West, tlf. 375284 / 575284

**Annars**
Samly Reinert, tlf. 318720 / 518720

**Tilmelding er** hjá Annu Mørkøre, tlf. 315280 ella Elisabeth Mortensen, tlf. 317244
ella teldupost: elisabeth1502@hotmail.com,
í seinasta lagi **fríggjdagin 11. apríl.**

Sp/f. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

Atlantic Brokers Ltd

**Djúpvatnstrolarin PHOENIX**



Um hóskandi boð fæst verður djúpvatnstrolarin PHOENIX seldur **við loyvum.**
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sci@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com